United Nations
Educational, Scientific and
Cultural Organization

The Faroese
National Commission
for UNESCO

**Áheitan á landsstýrismannin í mentamálum um at fáa UNESCO sáttmálan um verju av siðaarvi settan í gildi í Føroyum.**

Føroyska UNESCO nevndin vil við hesum heita á landsstýrismannin í mentamálum um at virka fyri, at UNESCO sáttmálin um verju av siðaarvi verður settur í gildi í Føroyum.

Á UNESCO aðalfundinum í 2003 samtyktu limalondini sáttmálan um verju av siðaarvi (the Convention for the Safeguarding of the Intangible Cultural Heritage). Sáttmálin fekk gildi frá 2006. Sáttmálin skal tryggja, at siðaarvur mannaættarinnar, so sum skaldskapur av mannamunni, framburður, siðir og siðbundið handverk, verður varðveittur.

Føroyski dansurin og kvæðini, føroyskt bátasmíð, virking av ull og siðir, ið eru knýttir at føroyska matinum, eru dømi um siðaarv føroyinga. Við at taka undir við sáttmálanum binda limalondini seg til at seta í verk skipanir og tiltøk, sum eru við til at fáa vitan um og kunnleika til siðaarvin bornan víðari til komandi ættarlið. Tiltøkini fevna um skráseting, gransking og útbúgving umframt at skapa karmar fyri, at siðaarvurin hevur sítt livandi virki í samfelagnum. Sáttmálin hevur ásetingar um ein lista við dømum um siðaarv mannaættarinnar. Listin er við til at varpa ljós á siðaarvin og týdning hansara. Í løtuni eru 314 evni eru á listanum.

Sáttmálin um verju av siðaarvi var samtyktur í Íslandi í 2005, í Noreg í 2007, í Danmark í 2010, í Svøríki í 2011, í Finnlandi í 2013 og í Grønlandi 2014.

Føroyska UNESCO nevndin er sannførd um, at verndin og varðveitingin av siðaarvi føroyinga eigur at verða skipað eftir somu kørmum sum í grannalondum okkara. Nevndin metir, at UNESCO sáttmálin er eitt týðandi amboð tá tað ræður um vernd av og virðing fyri siðaarvi mannaættarinnar. Føroyska UNESCO nevndin vil tí mæla til, at tikið verður undir við UNESCO sáttmálanum um verju av siðaarvi frá 2003.

Tórshavn, 4. juni 2015

Føroyska UNESCO nevndin

Sigurð í Jákupsstovu, formaður

Urd Johannesen, nevndarlimur

Sólvá Jónsdóttir, nevndarlimur

Jóhann Mortensen, nevndarlimur

Andras Mortensen, nevndarlimur

Margretha Jacobsen, nevndarlimur

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo